## DAGSINS MEINING

# Allir møguleikar opnir

Í dag fellur helst avgerðin um, hvussu verður við politisku naggatódnini. Um landsstýrissamgongan heldur fram, um nýval verður skrivað út, ella um Anfinn Kallsberg, løgmaður, fer at royna at finna aðrar flokkar at samstarva við til tess at finna eina loysn á sjálvstýrisspurninginum.

Eftir orðaskiftinum millum samgonguflokkarnar í útvarpinum fyrradagin at døma, verður helst ikki samgonguni lív lagað. Fyri Høgna Hoydal og Tjóðveldisflokkin hevur tað eftir øllum at døma alt at siga, at uppskotið – sum Høgni  Hoydal sigur er samgonguuppskotið minus fólkaatkvøðuna – verður borið niðan í tingið.

Fyri Fólkaflokkin er tað eftir øllum at døma ein ófrávíkilig treyt, at einki uppskot verður borið niðan í tingið, sum samgonguflokkarnir ikki eru samdir um. Sjálvstýrisflokkurin er so onkustaðni her ímillum.

Ein møguleiki er sjálvsagt, at løgmaður skrivar út nýval. Men løgmaður hevur sagt, at eitt nýval loysir ikki trupulleikan, og andstøðuleiðarin, Jóannes Eidesgaard hevur boðað frá, at eitt nýval bara fer at gera støðuna enn fløktari. Tí er hugsandi, at onnur samgonga verður skipað. Men røddir í Tjóðveldisflokkin hava eisini verið frammi um, at teir ikki undir nøkrum umstøðum vilja lata Javnaðarflokkin ella Sambandsflokkin sleppa fram at í Tinganesi, tí tá fellur øll vón um fullveldi til jarðar. Tí kundi hugsast, at Tjóðveldisflokkurin fer at verða sitandi í landsstýrinum.

Hetta man kortini metast sum ein hypotetiskur møguleiki, tí neyvan fer formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, at tíma tað. Hann hevur satsað alla sína politisku karrieru upp á fullveldismálið, og verður hann nú rendur fastur í fullveldismálinum, verður hann neyvan gamal í Tinganesi.

Nú fullveldiskósin er slept, standa allir møguleikar opnir fyri at skipa eina samgongu, sum kann fáa í lag eina nýggja skipan, sum innber føroyskt sjálvstýri. Gott hevði verið, um hetta málið varð loyst í hesum valskeiði – so málið varð lagt aftur um, og vit aftur kundu arbeitt við veruliga politikkinum…

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI



### Kári Post á ting

Broytingarnar í umboðan sjálvstýrisflokksins í samgonguni broytt eisini umboðan flokksins á tingi. Nú Helena fer úr Tinganesi, fer hon aftur í løgtingið og so má Jákup Sverri Kass út. Hann er varamaður. Sámal Petur fer í Tinganes og næsti maður í Eysturoynni er Kári Højgaard, millum oyndfirðingar og hellumenn í hvussu er kallaður Kári Post.

Seinastu 30 árini hevur Kári koyrt postin norður um Heltnina og sær ein til at sær komin oyndfirðingur bara eitt petti av einum frímerki, ella eini ógoldnari rokning so verður hann mintur um Kára Post.

Kári er dámligur, vinsamur og prátingarsamur maður og hetta hevur givið honum so nógvar atkvøður, at hann eigur sess í býráðnum í Runavík, og nú eisini skjótt tingsess.

Kári er ein partur av bygdamyndini í Lamba, Søldarfirði, Oyndarfirði, á Hellunum og hansara uppgáva er meira enn at bera post. Hann prátar og er ein partur av tí sosiala lívinum, hendir nógv í samfelagnum og nógv er at tjakast um, so mugu tey seinastu á rutuni geva tol og tað gera tey eisini.

Kári er ein íðin maður og hann gongur við lív og sál upp tí tað sum hann fer undir. Hann er raskur útróðrarmaður og føriri mangan fongin heim og tað er ikki frítt, at postmaðurin hevur tygn millum útróðrarmenn, tað verið seg á Norðhavinum ella við línu eystanfyri. Hummararnir kenna seg heldur ikki altíð tryggar fyri Kára.

Neyvan fer Kári at sita tigandi á tingbonki. Oljuvinnan, fiskivinnan og fakfelagsspurningar hava hansara áhuga og vit fara at hoyra frá honum.

**je**

### Martin í Grund 75

Kendi skiparin og kommunupolitikkarin í Søldarfirði, Martin í Grund er farin upp um tey 75 árini. Hann er pápi nýggja landsstýrismannin í almanna og heilsumálum. Tað er ikki altíð at reglan ið sigur, sum faðir so sonur heldur, tí Martin hevur tikist lítið vil almanna og heildupolitikk í sínum lívi.

Martin er fyrst og fremst sjómaður og hann sigldi meginpartin av sínum vaksna lívið. Dugnaligur var hann á sjónum, so dugnaligur at hann fekk skjótt ábyrd. Hann endaði sum skipari og sigldi í mong ár sum skipari. Við dansku skonnartini Hertu, við nýbygdu Havørnini við R. C. Effersøe og hann hevur verið við øðrum skipum við.

Martin hevur altíð havt áhuga fyri samfelagsviðurskiftum og hann er sjálvstýrismaður av hjarta. Politiskt er hann royndast í kommunupolitikki. Hann hevur stjórnað Runavíkar Kommunu og hann hevur verið virkin í kommunupolitikki í mong ár.

Á skaldliga økinum hevur hann eisini roynt seg og ljóðmyndin um æðuparið, sum varð send í útvarpinum, fekk drúgva og góða umtalu millum fólk.

Privat er Martin Grundamaður og tað merkir at hann er skemtingarsamur og dugir at sita undir orðinum, tá góða lag er. Hann er giftur Mariu, heilhugað dalskvinna og tey eiga fimm børn, Mannbjørn, Ólavur, Sámal Petur, Klaus, sáli og Sólborg. Tillukku við degnum.

**je**

### Til minnis um Mary Thomsen

*17.feb. 1943– 28.aug. 2000*

”Tað er ein stutt, ein stokkut løta, so fara vit úr hesi verð.” Haldi hesin sangurin lýsir tað so væl, nú tá okkara góði granni Mary so brádliga, ja, líkasum bleiv rikt burt úr hesi verð.

Tað at hava eitt gott grannalag, er ein góður lutur. Hetta hevur unst okkum, og var Mary ein av teimum. At so nøkur av børnunum vóru javngomul, hevði uttan iva eisini sín leiklut. Fyrst tær báðar Kirstin og Durita, umleið eitt ár er í millum, men tó sum tveir tvinnaðir tráðir og síðani komu teir báðir beiggjanir, bert ein mánaður ímillum. Men sjálvt um tey vuksu upp og seinni fluttu í onnur lond at ganga í skúla, var Mary altíð góð at heita á. Klár við eini hjálpandi hond, millum annað tá okkurt skuldi seymast, ella um tú stóðst og manglaði okkurt. Hetta kom eisini til sjóndar í summar, tá vit báðar skuldu pynta javnaldrarnar báðar í føroysk klæðir, tá teir gjørdust pisur. Tá  so tíðin byrjaði at ganga undan og eg ikki var liðug við troyggjuna, segði Mary ein dagin:” Anna! Fá nú hasa troyggjuna lidna, eg havi sagt, at eg skal seyma tær hasi knappholini.” Sjálvt um arbeiðið var gjørt við maskinu, var tað ein uppgáva, sum mangur vildi biðið sig undan, men her kom hennara lyndið fram. At halda tað hon hevði lovað og at tora at taka ábyrgd. Ikki munnu tað vera so fá, sum eru henni takksom fyri, at hon tók ábyrgd av mongum ervi og øðrum hátíðarhaldum. Vit vita at hennara lutur ” at tæna við



borðini ” ikki lá eftir, ikki minst í ” Filadelfia.

Eisini eru tey mong, sum hava havt Mary sum sín fyrsta arbeiðsgevara, tá hon hevði kioskina og kendu tey hana sum ein góður arbeiðsgevari, bæði við rísi og rósi. Sjálvt um tey ofta vóru rættuliga ung, vísti hon teimum álit.

Nú er so tómt norðanfyri, eingin Mary í havanum, í prátið við ommubørnini. Ella eingin at fáa eitt prát við undir snóratrænum og eingin sum sæst stákast frammanfyri køksborðinum. Í heyst var tað eingin, sum opnaði vindeyga og spurdi, um eg skuldi hava fruktkassar til eplini. Tað var ikki tí at kioskin var seld, nei røddin var tagnað.

Men tómrúmið hjá tykkum Eyðfinni, Anniku, Tanju, Duritu, Roberti og øllum tykkum, ið stóðu henni nær, er so stórt at tað er ringt at skilja.

Her eru orð so fátøk ein troyst, men vita skulu tit, at okkara tankar eru hjá tykkum, og bønin um at Harrin má geva tykkum styrki at liva í og við sorgini.

Friður veri við minninum um okkara góða granna Mary Thomsen

**Anna**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Stríðið um Brimil er ikki tapt enn

**Skipara- og Navigatørfelagið fer ikki at seta tiltøk í verk, nú Løgtingið hevur avgjørt ósemjuna um lønina á Brimli. Nú er at fáa sum frægast burturúr, sigur formaðurin í felagnum**

BRIMIL
*Áki Bertholdsen*

– Nú mugu vit bara royna at fáa sum frægast burturúr.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag fer ikki at seta tiltøk í verk, hóast Løgtingið nú hevur avgreitt  ósemjuna um lønina hjá skipara og stýrimonnunum á Brimli.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørferlagnum hevur ongantíð  áður viljað sagt, um felagið fer at seta tiltøk í verk, um Løgtingið leggur seg út í málið.

Men nú Løgtingið endaliga hevur avgreitt málið, ger hann greitt, at tað verða ongi tiltøk sett í verk.

– Løgtingið hevur talað og tað mugu vit boyggja okkum fyri. Og nú er bara at fáa sum frægast burturúr, sigur Ellintur Abrahamsen.



*– Nú má hetta standa sína roynd, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum*

Skipara- og Navigatørfelagið legði satsaði alt upp á at vinna skiparanum og stýrimonnunum eina munandi lønarhækking.

Tað, sum kom burtur úr, var, at hini bæði feløgini, sum hava limir umborð á vaktarskipunum, hava gjørt sáttmála, sum gevur maskinmonnunum, dekkarunum, bátsmonnunum og kokkunum á bæði Tjaldrinum og Brimli eina trivaliga lønarhækking.

Tað kom eisini tað burturúr, at Løgtingið setti eina nevnd at áseta lønina hjá skiparanum og stýrimonnunum. Men hendan nevndin skal bara áseta lønina hjá teimum, sum sigla við Brimli.

Sostatt er Vaktar- og Bjargingartænastan nú komin í ta heilt óvanligu støðu, at Skiparin á Tjaldrinum er ikki longur best lønti maður umborð, tí tað er maskinstjórin.

Og fyri at tað ikki skal vera lygn, er tað ongin annar enn Ellintur Abrahamsen sjálvur, sum er skipari á Tjaldrinum og sum fer umborð í næstum.

### Ikki tapt enn

Ellintur Abrahamsen sigur, nú er onki at gera, uttan at Skipara- og Navigatørfelagið velur síni umboð í nevndina.

Og enn vil hann ikki ásanna, at stríðið um Brimil er tapt.

– Tað veldst alt um, hvat kemur burturúr nevndararbeiðnum, sigur hann.

Hann sigur eisini, at umboðini, sum Skipara- og Navigatørfelagið velja í nevndina, fara at gera alt, sum gerast kann, fyri at lønin, sum nevndin ásetur, eisini skal umfata skiparan og stýrimenninar á Tjaldrinum.

– Tað skal standa sína roynd. Og fáa menninir á brúnni á Tjaldrinum ikki eisini lønarhækking,  er tað løgið, tí tað hevur øll hin manningin fingið.

Júst hetta er í veruleikanum einasti møguleiki, Skipara- og Navigatørfelagið hevur at hækka lønirnar á Tjaldrinum í hesum umfarinum, tí annars ganga sáttmálarnir ikki út fyrrenn í 2002.

Eydnast tað ikki at fáa lønirnar á Tjaldrinum upp nú, skal skiparin á Tjaldrinum sigla í eitt heilt ár afturat, uttan at vera hægst løntur umborð, sum annars vildi verið tað natúrliga.

### Stór provokatión

Ellintur Abrahamsen sigur annars, at provokatiónin til at vraka tað seinasta uppskotið hjá Fíggjarmálastýrinum var stór.

– Eftir tí, var t.d. byrjunarlønin hjá stýrimanninum lægri enn endalønin hjá bátsmanninum og tað sigur seg sjálvt, at tað kundi ikki góðtakast.

Hann fýlist eisini á samráðingarháttin hjá Fíggjarmálastýrinum.

– Tað var sum at samráðast við eini pistól í pannuni. Vit fingu at vita, at antin góðtóku vit uppskotið, ella avgreiddi tingið málið. Hetta er at misbrúka Løgtingið, heldur Ellintur Abrahamsen.

Karsten Hansen sigur hinvegin, at um Skipara- og Navigatørfelagið leggur allar lønarhækkingarnar saman, sum teir hava fingið ígjøgnum árini, var hækkingin størri, sum teimum nú stóð í boði.

Hann sigur eisini, at einaferð máttu samráðingarnar fáa ein enda.

– Vit hava nú samráðst í eitt hálvt ár. Vit hava brúkt ótrúliga tíð og orku uppá at loysa málið, men Skipara- og Navigatørfelagið vildi ikki flyta seg. Og nú eru samráðingar við yvir 30 onnur feløg byrjað, so tað liggur eitt ómetaligt trýst á Fíggjarmálastýrinum. Tí kundi hetta ikki halda fram longur, sigur Karsten Hansen.

# Royna at fáa Brimil til Føroya næsta vikuskiftið



*– Ætlanin er, at Brimil kemur til Føroya næsta vikuskftið og hann fer til verka beinanvegin. Lagt verður tá at í Havnini, har tað fer at bera til hjá fólki at fara umborð at síggja skipið*

**– Okkurt er eftir at gera umborð og útgerðin skal roynast fyri at tryggja, at alt virkar sum tað skal, áðrenn skipið kemur**

BRIMIL
*Áki Bertholdsen*

Gongur sum ætlað, kemur nýggja vaktar- og bjargingarskipið Brimil til Føroya næsta vikuskiftið.

Tað er í hvussu so er málið, sum Vaktar- og Bjargingartænastan hevur sett sær.

Eftir at Løgtingið avgreiddi ósemjuna um lønina hjá skiparanum og stýrimonnunum, eru allar forðingar beindar av vegnum fyri at skipið kann koma til landið.

Men tað fara kortini at ganga nakrir dagar, áðrenn hann kemur.

Elmar Højgaard, leiðari á Vaktar- og Bjargingartænastuni, sigur, at tað eru onkrir royndartúrar eftir at gera.

– Somuleiðis skal útgerðin eftirkannast, fyri at tryggja at alt virkar sum tað skal, áðrenn skipið kemur, tí tað hevði verið óheppið at verið noyddir til at farið yviraftur, um okkurt skuldi víst seg. Harafturat er okkurt smátt at gera við hann.

Sostatt kemur Brimil nú loksins til landið, meiri enn fýra mánaðir seinkaður.

Upprunaliga var ætlanin at sigla bygd av bygd í Føroyum at vísa skipið fram.

Men nú verður tað av ongum.

– Nú eru vit so nógv seinkaðir, at tað er frægast, at skipið fer til verka beinanvegin, sigur Elmar Højgaard.

Hann sigur kortini, at ætlanin er at laga tað so, at Brimil kemur á Havnina eina tíð, har tað ber til hjá fólki at koma umborð at síggja skipið. Tí ætla teir at laga tað so, at Brimil kemur á Havnina næsta vikuskiftið.

Annars kann tað koma upp á tal at vitja tær ymsu bygdirnar so hvørt, sum tíðin líður.

Elmar Højgaard gleðir seg annars til at Brimil nú kemur, tí sostatt fær Vaktar- og Bjargingartænastan virka til fulnar aftur fyri fyrstu ferð síðani 1997, tá ið ólavur Halgi varð seldur. Síðani tá hava tað verið lappaloysnir oman á lappaloysnir og tað hevur ikki verið serliga nøktandi.



## Avloysari

Fiskasølan søknast eftir einum avloysara til móttøku og matstovu okkara. Talan er um eitt parttíðarstarv til setan skjótast gjørligt.

**Starvið**
Tann, sum verður settur sum avloysari skal fyrst og fremst taka sær av viðskiftafólki, sum venda sær til móttøkuna ella ringja til okkara. Eisini skal avloysarin taka sær av lættari dagligari matgerð til starvsfólk okkara. Talan verður somuleiðis um annað fyrifallandi arbeiði.

**Umsøkjarin**
Vit leggja dent á at tú er álítandi, fyrikomandi og samstarvshugaður.

**Umsókn**
Umsókn verður at senda til Starvsfólkadeildina hjá Fiskasøluni í seinasta lagi mánadagin, hin 5. mars 2001. Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Guðrun Olsen, starvsfólkaleiðara, tel. 345 345.

FAROE SEAFOOD

Føroya Fiskasøla P/F • P.O. Box 68 • FO-110 Tórshavn
Tel +298 345 345 • Fax +298 345 100 • e-mail: faroe@faroe.com